# SIC fara út um Føroyar

**Føroyski rockbólkurin SIC fer komandi mánaðirnar undir eina rættiliga fjølbroytta og spennandi konsertferð, eitt nú til Grikkaland, Skotland og Ongland**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Müller Thomsen*
*eydunnudye@hotmail.com*

Seinastu tíðina hevur bólkurin SIC ikki verið so nógv at síggja til. Men man kann róliga siga at nógv hevur verið at hoyra um bólkin. USA, Ísland, Australia, Holland og Týskland hava øll ligið framvið og hildið eldin í SIC hesa seinastu tíðina.

Í vikuni bleiv so kunngjørt, at bólkurin skal til Athen í Grikkalandi.

Talan er um dagarnar frá 20.-25. november. Har verður ein konsert við SIC í mest vælumtókta rocksalinum í Athen, 'Underworld' sum er nakað heilt fyri seg. Listamaðurin aftanfyri fløguhúsan hjá SIC, Seth Siro Anton hevur designað spælistaðið við síni sermerktu list.

Eitt nú á www.hollywoodmusic.tv eru tey fullkomuliga bergtikin av hesum lovandi bólki. Tey hava eisini á myspace sínari lagt SIC á teirra top 24 lista.

Hetta er ikki heilt býtt. Tí teirra vinir á myspace telja annars yvir 22.000.

Hollywood Music Inc hevur millum 20.000 og 80.000 vitjandi um dagin. Og hetta hevur fingið eyguni upp fyri SIC.

### Rosegarden In Hell sum Sjónbandalag

Dagin eftir konsertina í Athen eru tveir langir arbeiðsdagar at síggja fram til.

Vælumtókta lagið frá SIC, 'Rosegarden In Hell' verður gjørt til sjónbandalag. Og aftur her stendur ein sera áhugaverdur maður aftan fyri produktiónini.

Sjónbandaprodusari og 'special effects maker' Achilleas frá Hypnagogia Films skal upptaka og produsera fyri SIC. Achilleas er sera kendur fyri sítt drúgva arbeiði frá stórfilmum sum Harry Potter 3 og Charlie & The Chocolat Factory. Hann hevur eisini móttikið ymsar virðislønir.

Eisini kann nevnast at Achilleas hevur arbeitt við tónleikabólkum so sum Dark Tranquility til Pet shop Boys.

### Lovandi sáttmáli

Sum nakað heilt nýtt kunnu limirnir í SIC í dag gleðast yvir eina nýggja avtalu, sum er komin í lag. Orpheous Spiliotopoulos hevur arbeitt sum promotari fyri eitt nú, Nuclear Blast Records, AFM - Records og starvast í lotuni hjá Warner Music í Grikkalandi. Hansara sáttmáli við SIC er tó uttan um Warner Music.



*Ein av kendu SIC-arunum*

*Mynd Eyðun Müller Thomsen*

### Ætlan fyri túrin

Allir limirnir í SIC motast í Keypmannhavn 16. november fyri at venja saman.

Eftirsum fleiri av limunum í dag búgva ymsa staðni í Danmark, hevur eingin venjing verið síðsta mánaðin.

20. November fara teir til Grikkalands, har teir skulu arbeiða og framfora teirra list í býnum Athen.

21. Nov verður konsertin í vælumtókta Underworld Club.

22. og 23. November fara upptokutólini síðani ígongd mitt í Athen.

Konseptið til sjónbandalagið er ikki kunngjort enn, men tað kann nevnast, at tað verður realistiskt við surrealistiskum elementum.

So tann 24. November fer Orpehous Spiliotopoulos saman við sínum kollega, við SIC í teirra radioshow. Sum er ein av mest vælumtóktu og stóru útvarpsrásunum í Grikkalandi.

Kenda blaðið Rock Hard fer eisini at vera har og gera eina frásogn.

Rock Hard gav floguni Pandemonium 8/10.

### Spot On! og Tutl

Hergeir Eldevig frá Spot On! hevur staðið fyri at skaffa fígging til túrin, og Tutl hevur stuðlað ferðini.

Hergeir frá Spot On! hevur arbeitt saman við SIC í uml. seks mánaðir.

Stór uppbakkan og nógvar arbeiðskreftir liggja aftanfyri bólkin í løtuni. Spot On! við Hegeir Eldevik rekur Management'ið hjá SIC, og Orpheous tekur sær av promotion og roynir samstundis at fáa sáttmála til SIC.

### Ár 2008 verður brennandi heitt

Nógv annað er á skránni, sum enn liggur í skugganum.

Hergeir Eldevig frá Spot On! hevur fingið bygt saman eina rundferð í Onglandi og Skotlandi við SIC í førarasetrinum.

Her kann m.a. nevnast.
23. jan 2008 Rockers, Glasgow, Skotland
24. jan 2008 Bannerman's, Edinburgh, Skotland
26. jan 2008 The Moorings, Aberdeen, Skotland
27. jan 2008 Westport Bar, Dundee, Skotland
28. jan 2008 Head Of Steam, Newcastle, UK
29. jan 2008 The Borough, Sunderland, UK

Enn er alt ikki kunngjort, men tað er greitt, at túrurin verður longri enn so.

# Búskapur og valstríð atskild

**Leypa Javnaðar- og Fólkaflokkurin nú frá búskaparligu semjuni, er tað ein nýggj støða. Tað er neyðugt, ikki at blanda búskaparpolitikk og valstríð saman, sigur Magni Laksáfoss**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




Semja var í samgonguni at lata skattalætta komandi ár, men aftur fyri skuldu avgjøld so leggjast á góðgæti og sodavatn, sum skuldi geva landskassanum eina meirinntøku upp á áleið 30 milliónir krónur.

Ella tað var tulkingin hjá Magna Laksáfoss, fíggjarmálaráðharra. Anfinn Kallsberg og Vilhelm Johannesen, ávikavist formaður og næstformaður í Fíggjarnevndini, siga seg einki kenna til hesa semjuna.

Til hetta sigur Magni Laksáfoss, at tað er neyðugt, at hinir flokkarnir ikki boygna í valstríðnum, men tora at halda fast við tær avtalur, sum eru gjørdar.

- Tað er neyðugt við greiðum útmeldingum frá formonnunum í Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum, um teir standa við semjuna, ið gjørd var. Skattalættin og øktu avgjøldini var ein samlaður pakki, sum ikki ber til at ríva sundur, sigur Magni Laksáfoss.

Hann vísir á, at tað undir fíggjarlógarviðgerðini var semja um, at tálma búskapin, og tá hildið varð fast við skattalætta, varð tálmanin framd gjøgnum hækkað avgjøld.

- Leypa flokkar nú frá hesi semju, so hava vit eina nýggja støðu, og eg vil ikki upp á forhond siga, hvat so hendir. Men eisini Nationalbankin vísir á, at búskapurin er upphitaður, so tað verður neyðugt at bremsa so ella so, sigur Magni Laksáfoss.

- Verður samlaði pakkin nú vrakaður, verður neyðugt at skerja á øðrum økjum, antin við at skerja aðrar útreislur ella á annan hátt.

Men tað er alneyðugt, at flokkarnir megna at halda búskaparpolitikkin og valfepurin atskildan, sigur Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri.



*Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri, heldur fast við, at tað verður neyðugt at tálma búskapin so ella so*